# Tangavirkið nærkast teimum 75

Í 1932 fór Palli Mortensen, vanliga nevndur Argja Palli, undir smiðjuvirksemi í Vági. Í dag situr triðja ættarliðið við róðrið á Tangavirkinum, sum er virkið um alt landið. .

Sum nevnt byrjaði fyritøkan sum smiðjuverkstaður. Í sekstiárunum fóru teir undir at gera ketlar til miðstøðuhita, men hørð kapping frá innfluttum ketlum gjørdi, at teir valdu at gevast við tí virkseminum í sjeytiárunum.

Ístaðin fyri legði virkið seg eftir at gera oljutangar, og hesi árini síðani hevur Tangavirkið gjørt nógvar tangar. Mortan Mortensen, stjóri, sigur, at okkurt árið hava teir latið einar 700 tangar, men hesi seinastu árini eru millum 200 og 250 tangar farnir út av virkinum um árið. Umframt vanligar oljutangar hevur virkið gjørt tangar til ymisk onnur endamál so sum flutningstangar.

Tangaframleiðslan svarar kortini ikki til meiri enn eini 10 - 15 prosent av søluni hjá virkinum, tí høvuðsvirksemið hjá Tangavirkinum í Vági er smiðjuarbeiði av ymsum slagi. Eitt nú gera teir stúttur og dragarar úr stáli til bygningar, eins og teir átaka sær ymsar umvælingar og ábøtur innan hita, sanitet og ventilasjón.

Nakrar uppgávur hevur virkið eisini havt fyri fiskiflotan. Eitt nú gjørdu teir nýggja verksmiðju umborð á trolaranum Sancy, eins og teir umvældu og nútímansgjørdu verksmiðjuna umborð á Rankanum.

Í dag arbeiða millum 12 og 14 fólk á Tangavirkinum í Vági





























